## Frætt frá forsetanum

Í Nigeria hava fólk loksins frætt frá forsetanum, Umaru Yar'adua, sum fór til Saudiarabia at søkja sær læknahjálp fyri tveimum mánaðum síðani, men sum ikki hevur latið frætta frá sær síðani. Ikki fyrr enn nú. Í samrøðu við bretska kringvarpið BBC sigur forsetin, at hann fær framvegis viðgerð, men at hann hevur tað betur. Hann dugir tó ikki at siga, nær hann verður so birgur, at hann kann fara aftur til Nigeria at røkja forsetaembætið. Í Nigeria hava fólk kravt at frætta frá forsetanum, og fleiri krevja, at hann kemur heimaftur, ella at hann letur embætið frá sær.



## Lærari hópdrápsmaður

Tann 38 ára gamli belgiski lærarin Ronald Janssen hevur langt síðani viðgingið, at hann myrdi ein mann og eina kvinnu í heimbýnum Halen í Belgia. Men tá hann aftur var til avhoyringar mánadagin, segði hann, at hann hevði eisini burturflutt og myrt eina unga gentu fyri tveimum árum síðani. Hetta hevur sambært blaðnum The Telegraph fingið løgregluna at kanna onnur burturflytingar- og drápsmál, eitt nú tá ein 18 ára gomul genta bleiv burturflutt og myrd í 2007. Belgiskir fjølmiðlar spyrja nú, at Ronald Janssen kann vera ein nýggjur Marc Dutroux, sum burturflutti og myrdi fleiri gentur í nítiárunum.

# Menn vita ov lítið um føðidepresjónir



**Gleðin við at gerast foreldur kann lættliga fáa ein bráðan enda orsakað av eini føðidepresjón – eisini hjá monnum. Men tað er nærum eingin, sum sigur hetta við teir nýggju páparnar. Tørvurin er har, men tilboðini vanta, siga donsk fakfólk**

FØÐINGAR
*Snorri Brend*

**Danmark:** Ein føðidepresjón kann minka um gleðina, sjálvt hjá teirri eydnusamastu familjuni. Og tað eru altso ikki bert kvinnurnar, sum verða raktar. Eisini pápani kunnu fáa kensluligar trupulleikar, soleiðis at talan í roynd og veru er um eina føðidepresjón.

Men hetta fáa teir bara ikki at vita!

Bæði Jordmoderforeningen og Fagligt Selskab for Sundhedsplejersker, eins og Gaia-Instituttet, sum bert tekur sær av slíkum trupuleikum, vita hvørki um skeið ella samtalur, sum greiða komandi pápum frá møguleikanum at fáa eina føðidepresjón.

Øll eru kortini samd um, at tørvur er á arbeiði at fyribyrgja hesum, og at ein samtala ella eitt skeið hjá lækna, heilsusystur, jarðarmóður ella sálarfrøðingi, hevði kunnað forðað nógvum føðidepresjónum hjá monnum.

- Í Fagligt Selskab for Sundhedsplejersker eru vit gjørd varug við trupulleikan, men hesin er lutvíst nýggjur, og tí hava vit eingi tiltøk at seta inn enn. Tað er ofta ógvuliga tilvildarligt, um heilsusystrarnar hoyra um trupulleikarnar hjá monnum, tá tær eru á heimavitjan.

- Men skal okkurt gerast, so er spurningurin um tað eru vit, praktiserandi læknarnir ella ein heilt triði partur, sum skal seta tiltøk í verk, sigur Susanne Hede, forkvinna í felagnum við Kristeligt Dagblad.

Føðidepresjónir hjá monnum er ikki ein sjáldsamur trupulleiki. Men sum Susanne Hede vísir á, eru bert fá ár síðani at granskarar komu fram til, at føðidepresjónir ikki bert koma fyri hjá kvinnum.

Yvirsálarfrøðingurin á Rigshospitalet, Svend Aage Madsen og sálarfrøðinginum, Tina Juhl hava gjørt eina kanning í árunum 2004 til 2006m sum vísti at umleið sjey prosent av øllum nýggjum pápum høvdu havt føðidepresjón.

Til samanberingar verða dupult so nógvar kvinnur raktar av hesum sama, vísir kanningin ið er tann einasta sum setur ítøkilig tøl á trupulleikan.

Neyðugt er við størri kunning til menninar. Jarðarmøðurnar eru í øllum førum sinnaðar til at gera meiri, um møguleikin var til staðar.

- Tað hevur altíð havt áhuga hjá okkum at fyrireika foreldrini, men trupulleikin er, at regiónirnar hava spart føðifyrireikingina burtur.

- Vit eru tí ikki vís í, hvussu stórur trupulleikin er, men vit vita at tað er ein trupulleiki, sigur menningarráðgevin í Jordemoderforeningen, Pernille Lotterup við blaðið.

